Fylgiskjal 10

**Nella Festirstein**

---

**Fra:** AAA001@politi.dk
**Sendt:** 24. maj 2019 14:52
**Til:** Nella Festirstein
**Emne:** SV: TIL UMMÆLIS: Ríkislógarmæli um at seta Politilógina í gildi fyri Føroyar. Freist 27. mai.

Góðan dagin, Nella

Eg vil siga frá, at vit í Føroya Politistafelag gjølla hava umrøtt lógaruppskotið um Politilógina, men vit hava ongar viðmerkingar til uppskotið.

Vinarlig heilsan,

Absalon Áargarð,
formaður


**Føroya Politistafelag**
**(Færøernes Politiforening)**

Yviri við Strond 17, FO-100 Tórshavn
Tlf. +298 351448 (lok. 5600)
Mobil +298 284882


---

**Fra:** Nella Festirstein <nellaf@tinganes.fo>
**Sendt:** 12. april 2019 16:33
**Til:** hem@sorinskrivarin.fo; Kølbæk, John (JKO017) <JKO017@politi.dk>; Elkin.Klettheyggj@kriminalforsorgen.dk; Mentamálaráðið <mmr@mmr.fo>; Almannamálaráðið <amr@amr.fo>; Heilsu- og innlendismálaráðið <himr@himr.fo>; kf@kf.fo; petersen@adv.fo; Áargarð, Absalon (AAA001) <AAA001@politi.dk>; megd@megd.fo; amnesty@amnesty.fo; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; Samferðslumálaráðið <smr@smr.fo>; 'dat@dat.fo' <dat@dat.fo>; 'industry@industry.fo' <industry@industry.fo>; Kundatænastan á TAKS <taks@taks.fo>
**Emne:** TIL UMMÆLIS: Ríkislógarmæli um at seta Politilógina í gildi fyri Føroyar. Freist 27. mai.

Hjáheft verður sent tykkum til ummælis uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar *Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om politiets virksomhed.*

**Freistin at senda ummæli er mánadagin 27. mai.**

Ummæli skal sendast til nellaf@tinganes.fo

Við hesum lógaruppskotinum verður sett í verk ein grundleggjandi og samla lóggáva fyri vanliga virksemið hjá politinum. Lógin ásetir eisini tær grundleggjandi meginreglurnar fyri valdsnýtsluni hjá politinum sum liður í vanligum skilhaldi. Við Politilógini verða greiða reglur á hesum øki. Hetta styrkir um rættartrygdina hjá borgarunum, samstundis sum at politiið fær eitt greitt grundarlag at arbeiða út frá í støðum, har politið fyri at kunna røkja sínar uppgávur, má fremja inntriv mótvegis borgarum, møguliga við at brúka tvingsil.

Endamálið við lógaruppskotinum er í høvuðsheitum at føra víðari og nágreina galdandi rætt á teimum økjum, sum § 108 í rættargangslógini í dag verður brúkt sum heimild at gera inntriv mótvegis borgarum. Tað er hvørki ætlanin at avmarka ella víðka verandi inntrivsmøguleikar. Lógin er tillagað føroysk viðurskifti við nøkrum smærri broytingum, sum kunnu síggjast undir serligu viðmerkingunum og í fylgiskjali 1.